## Huntington er ósunnast

Gamli námsbýurin Huntington í West Virgina verður mettur sum tann mest ósunni býurin í øllum USA. Tað skrivar tíðindastovan AP. Í býnum búgva 50.000 fólk, og teir flestu eru hvítir amerikumenn við europeiskum ættarbondum. Hevltin av teimum eru feitir. Fimtihvør av íbúgvunum í Huntington hevur hjartatrupulleikar, og helvtin av fólkunum yvir 65 ár hava mist tenninar. Harafturat er talið á roykjarum sera høgt, og triðihvør fær onga motión. Sambært kanningin, sum AP umrøður, er sunnasti býurin í USA Burlington í Vermont

## Horntónleikur í Miðlahúsinum

Konsert í Miðlahúsinum týsdagin 18. nov. kl 18.30 við Havnar Ungdómshornorkesti, Tórshavnar Ungdómsharmoniorkesti og messingkvintett. Leiðarar eru Ken Jones og Bjarni Berg. Venjarar eru Ólavur Olsen, Peder Riis og Christina Andersen. H.U.H hevur verið virki í fleiri ár. Síðstu tvey árini eru fleiri av teimum eldru spælarunum fluttir av landinum í lestrarøðrindum og hevur orkestrið síðani fingið fleiri nýggjar spælarar. Torshavnar ungdómsharmoniorkestur er eitt nýtt orkestur, ið var sett á stovn í ár. Hetta er sostatt fyrsta konsert hjá teimum. Orkestrið er, eins og H.U.H partur av Tórshavnar Musikkskúla. Tann sera vælspælanadi messingkvintett Tórshavnars hjá Kenneth Jones verður eisini við. Nógvur góður og stuttligur blásitónleikur verður at hoyra á konsertini sum byrjar kl 18.30 og er ókeypis.

# Blindafelaga skiftir navn

**Fríggjadagin 21. novembur verður skipað fyri evnisdegi á Føroya Blindastovni, sum í næstum skiftir navn til Sjóndepilin. Á degnum, sum er opin fyri øll, verður høvi hjá gestum at royna seg sum sjónveik**

EVNISDAGUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Komandi fríggjadag verður skipað fyri evnisdegi á Føroya Blindastovni. Endamálið við tiltakinum er at varpa ljós á stovnin og endamálið við honum. Á tiltakinum, sum samstundis er »opið hús«, verður møguligt at læra nógv um viðurskiftini hjá sjónveikum og blindum, og somuleiðis eisini at síggja virksemið hjá stovninum.

Danin Steen Evald, ið er myndamaður hjá donsku kongafamiljuni verður á staðnum, og fer at hugleiða um hansara uppliving av at vera blindur. Tað ber so á, at Steen Evald viðvirkaði í eini sending, ið var á DR1, har fólk royndu seg við ymiskum brekum í ein dag. Hann skuldi royna seg sum blindur og hesum fer hann at greiða frá.

Gestirnir hendan dag sleppa eisini at royna seg. Við serstøkum brillum kunnu fólk royna at gera ymisk lítil handverk, so tað ber til at uppliva hvussu tað er at vera sjónveikur.

»Myrkt kaffi« kallast eitt tiltak har. Ein bingja er sett upp á staðnum, har als einki ljós verður inni. Her kunnu fólk seta seg við einum koppi av kaffi og njóta hann starblind.

Depilin ger vart við virksemiðsítt, og møguleikarnar, ið sjónveik og blind hava í Føroyum. Møguleikar at betra um umstøðurnar hjá teimum, við ymiskum hjálpartólum og ljósi, verða sýndir fram. Eisini møgulig frítíðarítriv, ið blind kunnu njóta, verða á staðnum. Millum annað ein byrsa, har oyruni verða nýtt at miða við.



*Uttanfyri húsið hjá Sjónsdeplinum verður ein bingja. Inni í bingjuni verður høvi at njóta ein kaffimunn í bølamyrkri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Nýtt navn

Føroya Blindastovnur fer eisini í næstum at broyta navn til Sjóndepilin. Stovnurin hevur í 20 ár virkað undir navninum, men tað er heldur misvísandi, sigur Karin Kass, dagligur leiðari,

- Seinastu árini hevur verið tosað um at skifta navnið, tí virksemið umfatar onnur enn bara blind. Navnið kann vera ræðandi, tí tað tykist um seinasta endastatiónin, men so er ikki. Depilin er fyri øll tey, ið hava trupulleikar útyvir vanligar brillur og optikk. Depilin arbeiðir fyri at betra um umstøðurnar hjá sjónsveikum, so hesi kunnu vera virkin á arbeiðsmarknaðinum, í heimunum og í frítíðini longri. Hóast navnið broytist verður virksemið og tænastustøðið enn hitt sama, sigur Karin Kass.

Í norðanlondunum rundan um okkum vísa hagtølini, at umleið 1% av íbúgvunum hava sjónstrupulleikar, við styrki mett til, at tey eru sjónveik. Í Føroyum er hetta talið nakað hægri, tí ymsar eygnasjúkur koma oftari fyri, orsakað av arvaligum viðurskiftum.

Nýggja navnið tiltalar ein breiðari skarða, og umboðar betri depilin, metir Karin Kass.



*Endamálið við evnisdegnum er at gera Sjóndepilin, sum Føroya Blindafelag broytir navn til, meira sjónligan*

*Mynd: Bergur Johannesen*

# Ótolandi larmur á eldrasambýli

**Røktarheimið Tjarnargarður var í desembur mánaði í fjør útbygt, men nýggi bygningurin er ótolandi at vera í, nógvar flatur og høgt loft styrkja um larmin har. Tað er gjørt vart við trupulleikan, men málið er mest sum steðgað upp**

HØLISVIÐURSKIFTI
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í felagsrúminum á røktarheiminum Tjarnargarði í Havn, er ófatiliga nógvur gangur. Nýggi bygningurin, ið var tykin í nýtslu fyri góðum 11 mánaðum síðan, hevur høgt loft og nógvar flatur, hetta hevur við sær at ljóðið í rúminum verður kastað aftur og fram.

Hensia Einarson er leiðari á røktarheiminum og greiðir frá at óljóðið í rúminum er ótolandi fyri starvsfólkið. Tað órógvar ikki nógv av búfólkunum, tí hjá fleiri av teimum er hoyrnin somikið vánalig, men tey avvarandi hava gjørt vart við trupulleikan. Rúmið verður nógv nýtt, tí tað er felagsrúmið har. Serliga uppundir máltíðirnar er nógvur gangur, greiðir hon frá.

Ein ljóðkanning er gjørd av rúminum, og tað vísti seg at larmurin í rúminum var nógv meira enn mest loyvda mark. Sokallaða eftirklangstíðin var alt ov long. Kanningin varð beinavegin latin bygginevndini og húsaumsitingini hjá kommununi og somuleiðis arkitektinum, men einki nýtt er í málinum síðan juli mánað í ár.



um trupulleikan, sum tey avvarandi.

Arkitektavirkið skal møguliga gjalda endurgjald

- Vit hava tikið bólið í brúk og hoyra nú, at tað er ov nógv óljóð í gerandisdegnum hjá teimum, ið búgva har, men bygningurin er enn so nakað nýggjur, at garanti enn er á honum, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri. Hann greiðir [illegible]

- Tað verður millum [illegible] um og arkitektarnar. Tað er garanti á bygninginum, og vit taka tað harefir, sigur Heðin Mortensen. Harald Bjørgvin sigur hinvegin, at búskaparliga liggur alt hjá Tórshavnar kommunu.

*Eftir tað var gjørt vart við trupulleikan varð skjótt lovað at fara til verka*



*Nógvi gangurin í felagshølinum ger tað ótolandi at arbeiða og vera í, greiðir Hensia Einarson, leiðari, frá*

*Mynd: Bergur Johannesen*